# Upsi – semipelagiskar kanningar

**Jákup Sverri, túrur nr. 2246**
**Tíðarskeið: 7-11/10 2022**
**Ábyrgd:** Petur Steingrund

**Endamál:** *Høvuðsendamálið við túrinum var at vita, um upsi gongur upp frá botni í stórum nøgdum á føroyska landgrunninum.*




---

## Samandráttur

Lítið hevur verið at fingið av upsa seinastu árini og tað hevur verið ført fram, at upsi møguliga gongur upp frá botni og tí ikki kemur í botntrol í nóg stóran mun. Eftir áheitan frá Fiskimálaráðnum var hesin túrur tí gjørdur. Tóvað varð við einum svartkjaftatroli eitt sindur upp frá botni fyri at vita, um nakað fekst av upsa. Úrslitini vístu, at ikki ein einasti upsi varð fingin (Talva 1). Hetta bendir á, at tað eru sera smáar nøgdir av upsa upp frá botni. Hinvegin fiskaði trolið smáar nøgdir av rognkelsi, hýsu og øðrum fiskasløgum, tilsamans 92 fiskar, og hetta var sum heild smáur fiskur.

## Um túrin

Vit fóru av Havnini fríggjadagin 7. oktober og byrjaðu við at taka tvey hál eystanfyri. Fóru síðan longur út eystanfyri á upsaleið. Máttu inn at kroka vegna vánaligt veður. Royndu síðan í kantinum eystan fyri Suðuroyabanka á upsaleið. Vit endaðu túrin 11. oktober.

## Prøvatøka

Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu (Talva 1) er víst niðanfyri.

## Reiðskapur

Lítið flótitrol við 135 mm meskum í posanum. Smáir Thyborøn lemmar. Ekkolod EK80 (18, 38, 20, 120, 200 og 300 kHz).

## Fólk við frá Havstovuni

Poul Vestergaard (toktleiðari)
Gunn Hansen.
Petur Steingrund var kanningarleiðari, men var ikki við á túrinum.

Talva 1. Veiða á túri 2246 fyri tey 9 hálini.

| Fiskaslag | Veida (g) | % | Tal fiskar | Miðalstødd (g) |
|---|---|---|---|---|
| Rognkelsi | 34550 | 51.94 | 10 | 3455 |
| Hýsa | 17475 | 26.27 | 25 | 699 |
| Hvítingur | 7370 | 11.08 | 11 | 670 |
| Agnhøgguslokkur | 4938 | 7.42 | 17 | 290 |
| Hvalspýggj | 670 | 1.01 | | |
| Makrelur | 538 | 0.81 | 3 | 179 |
| Svartkjaftur | 516 | 0.78 | 13 | 40 |
| Mjái prikkafiskur | 303 | 0.46 | 10 | 30 |
| Knurrhani | 115 | 0.17 | 1 | 115 |
| Skrambul | 35 | 0.05 | | |
| Lakssild | 5 | 0.01 | 2 | 3 |
| Tilsamans | 66515 | 100.00 | 92 | |